ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208
110 Tórshavn

5. januar 2026
Mál: 25/20844-45
Tygara Skriv:
Viðgjørt: -

LM-057/2025 : Uppskot til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum var á fundi við Løgtingsins fíggjarnevnd tann 11. desember 2025, saman við Landsverki.

Á fundinum var kunnað um verkætlanina, og svaraði landsstýriskvinnan og Landsverk spurningum frá nevndini.

Landsstýriskvinnan kunnaði nevndina um møguliga áhugaósemju (interessukonflikt) í sambandi við ráðgeving í sambandi við arbeiðið at tetta lekar. Hetta er nýggj vitan, ið ikki er viðgjørd. Avtalað varð, at landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum skuldi svara nevndini aftur, tá ið málið er viðgjørt.

Landsverk hevur viðgjørt málið og hevur greitt landsstýriskvinnuni í heilsumálum frá, at hóast ráðgevingin ikki sjálv metti, at talan er um áhugaósemju, so er tað týdningarmikið, at eingin ivi kann vera um óhefta ráðgeving í sambandi við umvælingarnar í H-bygninginum.

Við støði í hesi meting, hevur Landsverk avgjørt at velja annan ráðgeva til víðari arbeiðið. Avgerðin er tikin fyri at tryggja óhefta ráðgeving og fyri at forða fyri, at møgulig áhugaósemja - verulig ella uppfatað - kann seta arbeiðið ella avgerðir í iva.

Landsverk metir, at henda tilgongd er tann mest hóskandi við atliti at áliti, sakligheit og góðari fyrisiting.

Almanna- og heilsumálaráðið er samt við Landsverki í hesum.

Við grundarlagi í, at málið nú er viðgjørt og grundarlagið er broytt, heitir landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum á Løgtingsins fíggjarnevnd um at halda fram við viðgerðini av málinum.

Vinaliga

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/

Bjørgfríð Ludvig
aðalstjóri